Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Dagfesting
16. mars 2018

Okkara j.nr.
18/00903-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr. 16/01186

**Viðv.: uppskoti til broytingar í fólkaskúlalógini**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda uppskot, sum varð sent felagnum tann 19. februar 2018.

Í teldupostinum, sum fylgdi við uppskotinum varð innkallað til hoyringsfund í Mentamálaráðnum tann 21. februar 2018.

Á hesum fundi kom fram, at hoyringsfundurin var ætlaður at koma í staðin fyri eina formliga hoyring.

Kommunufelagið vísti á fundinum á, at ein slíkur fundur kundi vera ein skilagóður liður í fyrireikingararbeiðinum, har ráðið hevði møguleika at greiða nærri frá, hvørjar broytingarnar vóru, soleiðis at hoyringspartarnir vóru betri førir fyri at fara hvør til sítt og umhugsa, hvørjar viðmerkingar teir skulu hava til málið.

Hinvegin kann ein hoyringsfundur ikki koma í staðin fyri eina vanliga hoyring. Vanliga er endamálið við eini hoyring at fáa viðkomandi sjónarmið frá pørtum, sum hava áhuga í málinum sum er til viðgerðar.

Júst tá talan er um fólkaskúlan, hava kommunurnar ein stóran leiklut í at tryggja teir fysisku karmarnar, ið fólkaskúlin skal virka undir. Kommunurnar hava tí ein beinleiðis áhuga í at verða hoyrdar í slíkum viðurskiftum.

Tað, at Kommunufelagið er hoyringspartur, er ein praktisk fyriskipan, sum hevur til endamáls at lætta um samskiftið og tilgongdina millum myndugleikarnar og einstøku kommunurnar. Í hesum sambandi má Kommunufelagið tó tryggja sær, at áhugamálini hjá kommunala geiranum verða røkt, og hetta gerst við at vera í tøttum samskifti við einstøku kommunurnar, hvørs viðurskifti eru til viðgerðar. Í einum máli sum hesum er tað tí umráðandi, at kommunurnar fáa stundir at umrøða og viðgera ivamálini og venda aftur, soleiðis at Kommunufelagið kann samansjóða ein felags kommunala støðu.

Kommunufelagið fer tí staðiliga at mótmæla, at hoyringsfundir verða nýttir í staðin fyri eina vanliga hoyring, bert tí at fyrireikandi arbeiðið í ráðnum ikki er lagt nóg væl til rættis av fyrstan tíð, soleiðis at gjørligt er at halda bæði framløgufreistir og hoyringarfreistir.

Kommunufelagið

Viðvíkjandi teimum ítøkiligu broytingum, ið ætlanin nú er at gera, hevur Kommunufelagið hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi broytingini í § 5 at næmingarnir skulu hava lærugreinina handaverk og list øll sjey árini frá fyrsta til og við sjeynda skúlaárið, er tann viðmerking, at skal endamálið við uppskotinum vera at styrkja lærugreinina, so eigur tímatalið eisini at hækka. Í núverandi lóg stendur, at næmingarnar skulu hava handaverk og list í fimm ella fleiri skúlaár í 1.-7. skúlaári.

Viðvíkjandi § 45 stk. 6 um serskúla og sertilboð og nýtt stk. 7, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúla ella undirvísingartilboð sambært stk. 6, er tað at viðmerkja, at markamótið millum serskúla og sertilboð eigur at verða greinað. Kommunurnar hava eina røð av sertilboðum av ymsum slagi til børnini. Sum dømi kann nevnast, at í Tórshavnar kommunu eru fleiri sertilboð, t.e. 4-10 tilboðið í Skúlanum á Fløtum, autismutilboðið í Hoyvíkar skúla, Lopfjølin í Magarinfabrikkini í samstarvi við Skúlan á Fløtum og í Nám X í Eysturskúlanum. Umleið 60 næmingar eru í hesum tilboðunum.

Tær sernámsfrøðiligu fyriskipanir, sum fremjast skulu fyri næmingar við serligum avbjóðingum, fyrihalda seg ikki til, at tey yngstu skúlabørnini í flestu førum eisini eru í frítíðarskúla – og í fleiri førum í sama bygningi. Í hesum uppskoti er ikki tikið atlit at hesum. Ein góð tilgongd hesum viðvíkjandi er at hugsa breiðari enn bert skúla og taka frítíðarskúla og/ella námsfrøðiligu ressoursirnar har inn í fyriskipanina og fáa heimild til hetta.

Viðvíkjandi fíggjarligu avleiðingunum av uppskotinum stendur í viðmerkingunum til uppskotið, undir pkt. 2.1, at

> "Uppskotið í sær sjálvum ikki áleggur landi og kommunum størri útreiðslur, uttan so at tímatalið í Førleikastovuni verður økt, og at fleiri skúlatilboð verða skipað til næmingar við serligum avbjóðingum. Hesi viðurskifti kunnu krevja hægri játtan til fólkaskúlaøkið, og at kommunurnar útvega hølir, amboð, innbúgv og tilfar. Hesar útreiðslur kunnu vera neyðugar á komandi fíggjarlógum hjá landi og kommunum fyri fíggjarárið 2019."

Kommunufelagið metir ikki, at henda viðmerking er nøktandi. Sum nevnt á hoyringsfundinum kundu vit hugsað okkum, at tað í viðmerkingunum bleiv arbeitt meira við at útgreina, hvussu økið sær út í dag, sæð í mun til hvat broytingarnar koma at merkja. T.d. hvussu nógvar førleikastovur eru, hvat kosta hesar í starvsfólkatímum og hølisumstøðum, hvussu nógvir næmingar eru í dag, hvørjar eftirmetingar eru gjørdar av førleikastovum, hvussu er gongdin yvir tíð, hvørjar metingar liggja um tørvin framyvir o.s.fr.

Tað er væl hugsandi, at henda vitan er tøk longu nú í Mentamálaráðnum ella aðrastaðni, men tað hevði verið skilabetri, um vitanin var partur av tí grundarlagi, ið støða skuldi takast útfrá.

Øll hesi viðurskifti hava týdning fyri, hvussu kommunurnar skulu skipa sína uppgávu við at útvega karmarnar til fólkaskúlan, og hetta gerst alt meira ítøkiligt tá fleiri kommunur, sum støðan er í dag, nýta fleiri hundraðtals milliónir uppá nýggjar skúlabygningar. Kommunufelagið kundi tí hugsað sær, at hesi viðurskifti vórðu betri útgreinaði í viðmerkingunum.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Kommunufelagið

Á nevnda hoyringsfundi kom eisini fram, at uppskotið til lógarbroyting, ið fyriliggur nú, er liður í eini røð av smærri broytingum í fólkaskúlalógini, sum arbeitt verður við, og sum ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum varðar av.

Sæð frá einum kommunalum sjónarhorni og í ljósinum av teimum uppgávum, sum kommunurnar hava at skipa karmarnar kring fólkaskúlan, metir Kommunufelagið, at tað hevði tænt tilgongdini til broytingar í fólkaskúlalógini, at viðurskifti av felags áhuga og innihaldi vóru umrødd og reguleraði í tøttum samstarvi millum Mentamálaráðið og kommunurnar.

Vit kundu tí hugsað okkum at blivið kunnaði nærri um tær broytingar, ið ætlanin er at arbeiða við. Samstundis kann upplýsast, at Kommunufelagið er í ferð við at skipa ein verkstovu fyri kommunala geiran, ið hevur til endamáls at varpa ljós á avbjóðingar og ógreið viðurskifti, ið kommunurnar sita við í mun til galdandi fólkaskúlalóg. Hetta kundi hóskandi blivið ein partur av tí arbeiði sum skilst, nú skal fara fram í ráðnum.

Samanumtikið saknar Kommunufelagið ein tættan dialog um, hvørjar ætlanir myndugleikarnir hava við fólkaskúlanum.

Hjálagt sum skjal er avrit av viðmerkingum frá Tórshavnar kommunu til lógarbroytingina.

Eftir umstøðunum verður avrit av hesum skrivi eisini sent til Løgtingið.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo